# Komu til jamboreeína á ólavsøku

**Tíðindi frá føroyska jamboreeliðnum**

Leygarmorgunin 28. juli 2007 komu føroysku skótarnir til heimsjamboree'ina, sum verður hildin í Onglandi. Eftir innskriving á einum gomlum flogvølli í nánd av leguplássinum, vórðu liðini víst uppá pláss.

Jan á Argjaboða, ið er liðleiðari í Munin, greiðir frá, at ferðin úr Skotlandi hevur gingið væl, men øll vóru sera móð eftir at hava sitið í bussinum í 10 tímar.

Munin hevur fingið pláss í undirleguni FJORD, meðan Hugin hevur fingið pláss í undirleguni JUNGLE.



Føroyska skótaliðið HUGIN klárt at fara til setanina



Mathilda úr MUNIN seymar jamboree-merkið á búnan



Undir setanini varð skótalógin lisin upp á enskum og fronskum

## Setanin

Áðrenn setanina samlaðust skótarnir í undirlegunum, haðani teir við enskum riddarum á odda gingu teinin til ARENA, har setanarhátíðarhaldið fór fram.

Kl. 13.30 byrjaði hátíðarhaldið við fýrverki. Dansarar vístu eyðkenni fyri teir fýra partarnar av Stórabretlandi - Skotland, Wales, Nordurírland og England. William prinsur og hertogin av Kent vóru hjástaddir. Í heilsu síni legði hertogin dent á, at hetta varð høvi hjá ungdómi at læra onnur fólkasløg at kenna og hvønn týdning hetta hevur fyri at skapa frið í heiminum. Hertogin bar eisini skótunum heilsu frá ensku drottningini.

Fallskýggjaleyparar dalaðu av himni vid flagginum hjá alheimsskótarørsluni, sum síðani varð vundið á stong sum tekin um at 21. heims jamboree'in var sett.

Skótalógin og skótalyftið, ið eru felags eydkenni fyri allar skótar, vórðu lisin upp av tveimum ungum luttakarum, Dan úr Onglandi og Hannah frá Morocco.

Setanin endaði vid góðum tónleiki og rundan um føroysku luttakararnar sóust skótar úr Libanon og Ísreal taka í hondina á hvør øðrum, áðrenn skótarnir av sínum eintingum fóru at dansa í longum røðum vid ungarum, japanum, amerikanum og føroyingum millum hvør annan.

## Heima á leguøkinum

Sunnudagin 29. juli 2007, varð nýttur til at innrætta heimið komandi 10 dagarnar. Fleiri tjøld vórðu sett upp, so allir skótarnir kundu hava eitt rúmligt innivist og fløgg, myndir og annað prýði varð sett upp, ið kann lýsa Føroyar fyri hinum skótunum.

Skótarnir vóru til virksemi á undirleguni og riggaðu sær búnarnar til við jamboree-merkinum.

Ólavssøkan varð ikki serliga sjónlig, men skótarnir ynsktu hvør øðrum góða ólavsøku og leiðararnir samlaðust eina løtu at práta og hugna sær.

# Samfelagstænasta og vinalag



Oda og Erika framman fyri eitt tjald hjá grannaliðnum úr Korea



Ra-On Kim og WOn Young Choi saman við skótavinum úr grannaliðnum frá Korea



**Seinasta nýggja**
**30. juli 2007/DRH**

Oda og Erika saman við hinum úr MUNIN hava í dag verið til STARBURST virksemi. Tær fóru tíðliga í morgun vid bussi til Stansted bý, har tær hava málað toilettini á einum skúla (ljósareyð, grøn og lillafarvað) og tær hava verid á gonguferd runt í býnum.

STARBURST hevur sum endamál at gera samfelagssinnið, ið skótarørslan leggur dent á, ítøkiligt. Somuleiðis er endamálið við STARBURST at vísa skótunum, hvat kann røkkast við at starva saman.

Á leguplássinum í undirleguni JUNGLE, har MUNIN heldur til, er norðurlendsk vinarlag. Føroysku skótarnir hava leguøki saman við grønlendskum skótum og hóast føroysku og grønlendsku patruljurnar gera mat hvør í sínum lagi, er alt at rokna sum eitt lið.

Altjóða vinarlagið er eisini sjónligt. Sunnanfyri býr eitt skótalið úr Portugal og eystanfyri býr eitt skótalið úr Korea.

Vit fóru at vitja á leguplássinum hjá skótunum úr Korea. Won Young Choi greiðir frá, at flestu skótarnir í teirra liði eru úr Seoul. Tey fóru heimanifrá 24. juli og hava ferðast við flogfari umvegis Hongkong til Onglands.Skótavirksemið hjá teimum fevnir m.a. um at kava, fjallaklintring, k-renning og gonguferðir. Tey hava vanliga skótafund aðru hvørja viku. Annars eru tey sera spent í at vera komin á eina so stóra legu.